1. útgáva 2007

betri

# Íløgutreytir

1. útgáva 2007

betri

# Íløgutreytir


| | | |
|---|---|---|
| §1 | Íløgutreytir | 3 |
| §2 | Tekniskt grundarlag | 3 |
| §3 | Allýsingar | 3 |
| §4 | Betri samansparing | 3 |
| §5 | Innliman og eftirlønarinngjøld | 3 |
| §6 | Kostnaður | 4 |
| §7 | Kursir tá ið goldið verður inn og út | 4 |
| §8 | Úrtøka og annað | 4 |
| §9 | Uppgerð yvir hvussu nógv eftirlønarsamansparingin er verd | 4 |
| §10 | Uppgerð yvir hvussu nógv eftirlønar-samansparingin er verd,tá ið tryggingar-takarin doyr | 4 |
| §11 | Ábyrgd fyri íløgum og gongdini við eftirlønarsamansparingini | 4 |
| §12 | At skifta váðastøði | 5 |
| §13 | Fulltrú | 5 |
| §14 | Afturkeyp | 5 |
| §15 | Broyting í íløgutreytum | 5 |

betri

# Íløgutreytir

## §1 Íløgutreytir

**1.stk.:** Hesar treytir eru galdandi fyri eftirlønarsamansparing og annað í Betri Pensjón (eftir hetta skrivað Betri).

**2.stk.:** Íløgutreytirnar galda fyri Betri samansparing.

## §2 Tekniskt grundarlag

**1.stk.:** Samansparing og kostnaður í sambandi við eftirlønarsamansparingina eru lagað eftir tí tekniska grundarlagi við tilhoyrandi reglugerð um íløgur, sum eina og hvørja tíð er galdandi fyri Betri, og sum er fráboðað Tryggingareftirlitinum. Tekniska grundarlagið og annað verður útflýggjað, tá ið ein vendir sær til Betri.

## §3 Allýsingar

**1.stk.:** Í hesum íløgutreytum er tryggingartakarin tann, ið eigur eftirlønarskipanina ella íløgusáttmálan.

**2.stk.:** Í hesum íløgutreytum er eftirlønarsamansparingin bæði ein vanlig eftirlønarsamansparing og ein íløgusáttmáli, hóast hesin seinni ikki er knýttur at eini eftirlønaravtalu.

**3.stk.:** Eitt handilssamdøgur er eitt tíðarskeið, tá ið Betri kann gera íløgur. Í einari arbeiðsviku við ongum heilidøgum eru 5 handilssamdøgur: frá mánadegi til týsdag, frá týsdegi til mikudag, frá mikudegi til hósdag, frá hósdegi til fríggjadag, og frá fríggjadegi til mánadag.

**4.stk.:** Keypskursur er kursurin, ið ein virðisbrævapartur í einum íløgugrunni verður keyptur fyri. Sølukursur er kursurin, ið ein virðisbrævapartur í einum íløgugrunni verður seldur fyri. Aloftast er ein ávísur munur á keyps- og sølukursi í einum íløgugrunni.

## §4 Betri samansparing

**1.stk.:** Við eftirlønarinngjøldunum í Betri samansparing ger Betri íløgur við at keypa virðisbrævapartar í íløgugrunnum. Hetta verður gjørt eftir tí áramáli, sum eftir er, til tryggingartakarin verður eftirløntur, og eftir tí váðastøði, ið tryggingartakarin velur.

**2.stk.:** Tryggingartakari kann velja millum fimm váðastøði: bert lánsbrøv, lágt váðastøði, miðal váðastøði, høgt váðastøði ella bert partabrøv. Verður einki støði valt, tá ið avtalan verður gjørd, verður eftirlønarsamansparingin sett á miðal váðastøði.

**3.stk.:** Íløgugrunnarnir í Betri samansparing eru aloftast nøkur fíggjarlig virði, ið verða umsitin uttanhýsis. Fíggjarlig virði kunnu til dømis vera partabrøv og lánsbrøv. Betri ger eftir bestu ætling av, hvørji virði eru í grunnunum, og Betri eigur virðini, ið íløga verður gjørd í.
Tryggingartakarin hevur so statt á ongan hátt rætt at ráða yvir virðunum. Lutfallið millum partabrøv og lánsbrøv og annað kann verða broytt, uttan at einstøku viðskiftafólkini verða ávarað um hetta, um so er, at Betri heldur, at hetta gevur størri úrtøku ella betri váða, enn galdandi lutfall. Heldur Betri, at tað loysir seg, kann Betri harumframt uttan ávaring beina burtur ella skifta út ein ella fleiri av teimum útvaldu grunnunum. Kortini skal Betri eina og hvørja tíð halda tær íløgureglur, sum nevndin hevur samtykt.

**4.stk.:** Betri ber so í bandi, at inngjøld verða býtt sambært tí valda íløgustøðinum og áramálinum, ið eftir er, til tryggingartakarin verður eftirløntur. Hevur kursgongdin í íløgugrunnunum við sær, at býtið broytist, ger Betri eina endurjavnviging, sum merkir, at býtið verður endurskapað. Endurjavnviging verður vanliga framd eina ferð um mánaðin.

**5.stk.:** Hvussu nógv eftirlønarsamansparingin er verd, og hvussu stór eftirlønarútgjøldini eru, veldst um hvussu gongdin er í teimum íløgugrunnunum, ið eftirlønarpeningurin er lagdur í (sí eisini § 10).

## §5 Innliman og eftirlønarinngjøld

**1.stk.:** Fyri at verða partur av Betri samansparing skal skrivlig avtala vera gjørd í seinasta lagi 10. avgreiðsludag áðrenn tann 1. í mánaðinum. Frá tí, at avtalan er gjørd, til samansparingin verður sett í valdu puljurnar, rentar kontan við rentustiginum fyri innlánspuljuna.

**2.stk.:** Inngjøld verða í høvuðsheitum sett í íløgur, ið galda frá 1. bankadegi í mánaðinum. Hetta er tó treytað av, at Betri hevur skrásett, at Betri hevur fingið inngjaldið í seinasta lagi tveir bankadagar áðrenn 1. bankadag í mánaðinum. Verður íløgan framd seinni, verður hon galdandi sum íløga frá 1. bankadegi í komandi mánaði.

**3.stk.:** Er íløgan seinkað orsakað av umstøðum, sum Betri onga ávirkan hevur á, kann Betri ikki verða ábyrgjað fyri fíggjarligan miss, ið seinkingin hevur elvt til. Betri ger síðan íløguna skjótast gjørligt eftir, at tað, sum forðar gjaldingini, er burtur; hetta soleiðis, at íløgan verður galdandi í seinasta lagi 1. bankadag í komandi mánaði.

betri

# Íløgutreytir

## §6 Kostnaður

**1.stk.:** Kostnaður, sum er partur av tí, ið er roknað út í sambandi við teknisku kontuna til eftirlønarsamansparingina, sæst í tekniska grundarlagnum og tilhoyrandi prísfylgiskjølum, sum eina og hvørja tíð eru galdandi. Kostnaðurin veldst um gjaldið fyri eftirlønarskipanina, innskot og samansparing. Eisini kann serligur kostnaður verða kravdur í sambandi við, at íløgur, sum eru grundarlag undir úrtøkuni í eftirlønarsamansparingini, verða broyttar. Umsitingarkostnaður verður tikin av kontuni hvønn mánað. Harumframt verða kostnaðir sum íløgugrunnar og røktarar krevja eisini álagdir.

**2.stk.:** Tá ið Betri samansparing verður endurjavnvigað (eisini í sambandi við at tryggingartakari skiftir váðastøði) verður hetta mett sum eitt útgjald. Aftaná verður flutta upphæddin goldin inn.
Tá ið endurjavnviging verður framd, verður vanligur handilskostnaður ikki álagdur.

**3.stk.:** Prísirnir samsvara við tekniska grundarlagið. Prísirnir galda eitt ár í senn og verða fráboðaðir Tryggingareftirlitinum. Prísirnir kunnu uttan serliga fráboðan verða brúktir bæði í sambandi við galdandi og nýggja eftirlønarsamansparing.

## §7 Kursir tá ið goldið verður inn og út

**1.stk.:** Tá ið íløgur verða gjørdar í sambandi við, at tryggingargjøld, innskot og annað verður goldið inn, verður keypskursur brúktur. Møgulig vekslisamsýning kann verða drigin frá.

**2.stk.:** Tá ið eftirlønarsamansparingin verður goldin út, tí at tryggingartakarin verður eftirløntur, ella tí at afturkeyp verður framt, verður sølukursur brúktur.

**3.stk.:** Tá ið ein Betri samansparing verður endurjavnvigað, verður eitt inngjald framt, eftir at endurjavnvigað er. Útgjald verður grundað á sølukurs, og inngjald verður grundað á keypskurs.

## §8 Úrtøka og annað

**1.stk.:** Sundurlutað úrtøka úr einum grunni verður brúkt til nýggjar íløgur í somu íløgugrunnum.

## §9 Uppgerð yvir hvussu nógv eftirlønarsamansparingin er verd

**1.stk.:** Hvussu nógv eftirlønarsamansparingin er verd, og hvussu stór eftirlønargjøldini eru, er treytað av gongdini í teimum íløgugrunnum, sum eftirlønarvirðið er lagt í.

**2.stk.:** Hvussu nógv eftirlønarsamansparingin er verd, roknar Betri út mánaðarliga sambært gongdini í sambandi við virðið í ognunum í teimum grunnum, sum eftirlønarsamansparingin er sett í. Virðið í eftirlønarsamansparingini er virðið í framdu íløgunum tilsamans.

**3.stk.:** Hvussu nógv eftirlønarsamansparingin er verd, verður gjørt upp mánaðarliga. Hetta virðið sæst í viðskiftamappuni á heimasíðuni hjá Betri ella verður útflýggjað, tá ið ein vendir sær til Betri. Hvussu gongdin er við virðinum, kemur til sjóndar í ársfrágreiðingini hjá Betri.

**4.** stk.: Virðið verður ásett við støði í sølukursum.

## §10 Uppgerð yvir hvussu nógv eftirlønarsamansparingin er verd, tá ið tryggingartakarin doyr

**1.stk.:** Doyr tryggingartakarin í tryggingarskeiðnum, og skal øll eftirlønarsamansparingin ella partar av henni gjaldast út í hesum sambandi, so setur Betri eftirlønarsamansparingina í miðal váðastøði í Betri samansparing. Hetta verður gjørt í seinasta lagi 1. handilssamdøgur mánaðin eftir, at Betri hevur fingið boð um, at tryggingartakarin er deyður. Verður umskipað seinni, verður íløgan galdandi frá endanum á 1. handilssamdøgri tann komandi mánaðin, uttan so at seinkingin er íkomin orsakað av umstøðum, sum Betri onga ávirkan hevur á.

**2.stk.:** Er seinkingin íkomin orsakað av umstøðum, sum Betri onga ávirkan hevur á, kann Betri ikki verða ábyrgjað fyri fíggjarligan miss, ið seinkingini hevur elvt til. Betri ger síðan íløguna í seinasta lagi 1. handilsdag í komandi mánaði eftir, at tað, sum forðar gjaldingini, er burtur.

**3.stk.:** Verður eftirlønarsamansparingin goldin út í sambandi við deyða, verður útgjaldsstøddin ásett eftir løtuni, tá ið Betri setur útgjaldið í verk. Ùtgjøld verða einans framd 1. bankadag í hvørjum mánaði.

## §11 Ábyrgd fyri íløgum og gongdini við eftirlønarsamansparingini

**1.stk.:** Tað, sum eyðkennir Betri samansparing, er, at virðið í eftirlønarsamansparingini og komandi eftirlønarveitingum er treytað av gongdini í sambandi við íløgurnar, sum eru gjørdar í avtaluskeiðnum.

**2.** stk.: Betri kann hvørki verða ábyrgjað fyri, hvussu tað

betri

# Íløgutreytir

gongur við eftirlønarsamansparingini ella úrtøkuni í avtaluskeiðnum, ella hvussu stór eftirlønarveitingin verður, tá ið avtornar. Hetta er galdandi, hóast eftirlønarsamansparingin ella eftirlønarveitingarnar í ringasta føri kunnu falla burtur vegna skeiva gongd í sambandi við úrtøkuna, ið stendst av framdu íløgunum.

**3.stk.:** Betri kann harumframt ikki verða ábyrgjað fyri møguligan fíggjarligan miss, ið er elvdur av, at íløgur í sambandi við at váðastøðið verður skift, ella at endurjavnviging ikki kann verða framd rættstundis. Hetta er tó bert galdandi, um orsøkin er umstøður, sum Betri onga ávirkan hevur á.

## §12 At skifta váðastøði

**1.stk.:** Tryggingartakari kann eina og hvørja tíð skifta valt váðastøði.

**2.stk.:** Verður annað váðastøði valt í sambandi við Betri samansparing, fevnir broytingin bæði um komandi inngjøld og virðið, sum longu er spart saman.

**3.stk.:** Verður annað váðastøði valt, ávirkar hetta støðuna frameftir. Broytingin skal fara fram á tann hátt, at tryggingartakarin skiftir váðastøði við at logga á sína Netpensjón umvegis heimasíðuna hjá Betri ella við at senda Betri eina nýggja og undirritaða íløguavtalu.

**4.stk.:** Verða broytingar framdar, bindur Betri seg til at fremja íløgurnar í seinasta lagi 1. bankadag komandi mánaðin eftir, at Betri hevur fingið nýggju íløguavtaluna, uttan so at serstakar treytir eru galdandi fyri íløguavtaluna ella valdu grunnarnar. Verður íløgan framd seinni, verður íløgan galdandi við endan á 1. handilsdegi í mánaðinum. Er seinkingin íkomin orsakað av umstøðum, sum Betri onga ávirkan hevur á, kann Betri ikki verða ábyrgjað fyri fíggjarligan miss, ið seinkingini hevur elvt til. Betri ger síðan íløguna í seinasta lagi 1. handilsdag í komandi mánaði eftir, at tað, sum forðar gjaldingini, er burtur.

**5.stk.:** Einstaka handilsavtalan kann verða fevnd av vanligum handilskostnaði, sum er sambært tí íløgureglugerð, ið eina og hvørja tíð er galdandi, og sum er fráboðað Tryggingareftirlitinum.

**6.stk.:** Betri sendir tryggingartakaranum eina váttan um, at handilin er framdur.

## §13 Fulltrú

**1.stk.:** Tryggingartakari kann geva einum øðrum persóni skrivliga fulltrú til at velja váðastøði, tá ið ein Betri samansparing verður stovnað. Henda fulltrú kann eisini fevna um heimild at skifta váðastøði í samansparingarskeiðnum.

**2.stk.:** Betri skal hava skjal, ið prógvar møgulig viðurskifti, sum snúgva seg um fulltrú.

## §14 Afturkeyp

**1.stk.:** Tryggingartakarin kann í summum førum keypa eftirlønarsamansparingina aftur (sí almennu tryggingartreytirnar um eftirlønarsamansparing). Í sambandi við afturkeyp kann tryggingartakarin ikki krevja at fáa íløgulutir útflýggjaðar heldur enn at fáa peningaliga uppgerð framda. Afturkeyp verða framd 1. bankadag í hvørjum mánaði.

**2.stk.:** Betri eigur keyptu virðini, grunnlutirnar og annað, og tryggingartakarin ræður á ongan hátt yvir virðunum, grunnlutunum og øðrum.

## §15 Broyting í íløgutreytum

**1.stk.:** Hesar íløgutreytir eru ein partur av tí tekniska grundarlagi, sum eina og hvørja tíð er galdandi, og sum er fráboðað Tryggingareftirlitinum.

**2.stk.:** Krevur Tryggingareftirlitið tað, ella boðar Betri Tryggingareftirlitinum frá eini nýggjari íløgureglugerð, kunnu íløgutreytirnar verða broyttar beinanvegin.
Nýggjastu og harvið galdandi íløgutreytirnar fyri íløgur og annað eru tøkar á heimasíðuni hjá Betri.

Betri pensjón
Yviri við Strond 2
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn
V-tal: 563609
telefon: +298 345 700
heimasíða: www.betri.fo
t-postbústaður: pensjon@betri.fo